# Virðiligir karmar um Tofta skúla

**- Hetta er eitt stórt frambrot bæði fyri skúlan og bygafólkið í Nes kommunu í síni heild, segði borgarstjórin, Símun Johannesen**

TOFTA SKÚLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

**Talurnar, sum vórðu hildnar við móttøkuna í Tofta skúla leygardagin, vóru allar góðar og áhugaverdar - á hvør sín hátt. Vit kundu hugsað okkum at gjørt burtur úr teimum øllum, men tíverri verður ikki pláss fyri øllum í hesum blaðnum.**

**Símun Johannesen, borgarstjóri, var fyrstur at røða, og hann hevði eina áhugaverda og ítøkiliga talu um søguna aftan 0fyri tann hábærsliga skúla, sum í dag stendur liðugur á Toftum.**

**Borgarstjórin fór langt aftur í skúlasøguna í kommununi, og her fingu fólk nógv at vita, sum mangur lítið og einki visti um frammanundan.**

**- Fyrst vil eg ynskja øllum vælkomnum, arkitektum, verkfrøðingum og handverkarum, sum hava bygt okkum hesar frálíku karmar. Síðan vil eg ynskja øllum gestum, sum komin eru at verða saman við okkum henda stóra dag – og til seinast, men ikki minst, vil eg ynskja øllum her úr kommununi, sum hava longst eftir hesum degi, at vera hjartaliga vælkomin.**

**Eftir at hava greitt frá gomlu og áhugaverdu skúlasøguni, kom Símun Johannesen fram til byggingina av tí skúla, sum framvegis er ein partur av verandi skúlaumhvørvi á Toftum.**

**- Nýggjur skúli kom í 1958, sum var eitt ótrúligt framstig. Hetta var ein skúli við seks stórum og ljósum skúlastovum, fimleikarhøll við umklæðingarrúmi og brúsurúmi. Her var ein inngongd til børnini og ein til lærarar, og her var lærararúm og stjóraskrivstova. Vit fingu innandura wc og pláss bæði inni og úti til børnini.**

**Símun segði, at skúlin, sum varð bygdur í 1958, smæddist ikki burtur millum aðra skúlabygging í Føroyum.**

**- Í 1962 kom framhaldsdeild á Toftum, og tá kundu næmingar velja at fara í real ella 8. flokk. Hetta var fyrsta framhaldsdeild av sínum slag uttan fyri Havnina. Tað var Jóhan Lamhauge, Jóhan-lærarin, sum hann vanliga varð róptur, ið var eldsálin, sum stríddist fyri at fáa hesa deild á Toftum, legði borgarstjórin aftrat.**

**Í 1981 varð skúlin aftur víðkaður, og nú varð hædd tikin nýggjum krøvum.**

**- Vit fingu stovu til alisfrøði, smíð/ evning, hondarbeiðsstovu, skúlakøk – og ikki at gloyma svimjihyl, sum aftur setti Tofta skúla millum teir fremstu í landinum.**

**Borgarstjórin kundi við hátíðarløtuna leygardagin fegnast saman við øðrum um, at nú er skúlin á Toftum so aftur bæði út-og umbygdur.**

**- Ásannast má, at teir karmar, sum vit nú eru í, aftur er eitt stórt frambrot bæði fyri skúlan og bygdafólkið í síni heild, segði Símun Johannesen, sum vit fara at venda aftur til í aðrari grein seinni í vikuni.**



*Myndin er tikin omanyvir nýggja partin av Tofta skúla, sum nú eisini er útgjørdur við stórari sólorkuskipan*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Størsta sólorkuskipan í Føroyum

**Tofta skúli hevur nógv ta størstu sólorkuskipan, sum higartil er sett upp í Føroyum, og skúlin hevur eisini aðrar forvitnisligar fasilitetir**

TOFTA SKÚLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í røðu síni við hátíðarhaldið í Tofta skúla leygardagin, segði borgarstjórin, Símun Johannesen, at Tofta skúli hevur nógv ta størstu sólorkuskipanina, sum higartil er sett upp í Føroyum.

- Nú so nógv fokus er á okkara umhvørvi, kann eg upplýsa, at vit hava sett upp eina 70 fermetra stóra sólorkuskipan á skúlanum. Hetta er soleiðis nógv tann størsta skipanin av sínum slagi í Føroyum.

Borgarstjórin vísti á, at tað almenna hevur stuðlað hesi verkætlan við 150.000 krónum, har ein partur av hesum peningi skal nýtast til uppfylging og kanningar av verkætlanini.

- Ein fylgibólkur er settur, sum skal taka sær av hesum, og skal eitt úrslit fyriliggja um eitt ár, legði borgarstjórin aftrat.

Av øðrum fasilitetum, sum nýggi Tofta skúli hevur, nevndi borgarstjórin eisini samtaluanlegg millum lærarar og næmingar, sonevndu smart-board talvurnar í hvørji skúlastovu, tráleyst internet um allan skúlan, og eisini hevur skúlin nú eina sjálvvirkandi ventilatiónsskipan.


## VESTMANNA KOMMUNA

Bakkavegur 16 | Postboks 91 | 350 Vestmanna

## VARALEIÐARI TIL LÁTIPÍPUNA

Søkt verður eftir avloysara fyri varaleiðaran í Látipípuni, at byrja skjótast til ber og arbeiða fram til 15. august 2009. Talan kann vera um niðursetta arbeiðstíð. Um eingin námsfrøðingurin søkir, verður hjálparfólk sett í starvið.

Stovnurin fevnir um útibarnagarð og frítíðarstovu. Varaleiðarin samstarvar við leiðaran um at leggja dagliga arbeiðið á stovninum til rættis, og at seta mál fyri stovnin, umframt aðrar uppgávur.

**Vit vænta, at:**
- tú hevur leiðaraevni
- tú dugir at seta mál fyri stovnin
- tú ert áhugað/-ur í at menna útibarnagarðin og frítíðarstovuna
- tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur góð samstarvsevnir
- tú megnar at at tryggja eitt greitt og jaligt samskifti á stovninum

**Vit kunnu bjóða:**
- ein grønan stovn í náttúruumhvørvi við góðum møguleikum fyri túrum í á, haga og fjøru
- ein stovn, har dentur verður lagdur á alla tíðina at menna arbeiðið við børnunum
- ein starvsfólkabólk, sum er opin fyri nýggjum avbjóðingum

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Núverandi setanarstaður er Látipípan. Setanarøkið er dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Vestmanna Kommunu á tlf. 470 110.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum og viðmælum skal vera Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. oktober 2008 kl. 12.00.

**Látipípan** er ein stovnur við útbarnagarði til 5-7 ára gomul børn og frítíðarstovu til børn í 1.-2. flokki.

Frítíðarstovan er inni á Fjørð – tætt við Fossá, fjøruna og sandin.

Dentur verður lagdur á at geva børnunum fjølbroyttar upplivingar saman við javnaldrum, og at læra tey at virða hvønn annan.

Útibarnagarðurin er í Miðalsbrekku í vøkrum náttúruumhvørvi millum Hórðará og Gjógvará – tætt við hagan.

Dentur verður lagdur á at geva børnunum upplivingar úti í náttúruni, og at búgva tey til at fara í skúla.